**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Túrur nr. 1848 Brislingur á innaru leiðunum, tíðarskeið 1-3/11 2018**

**Fólk frá HAV:** Eydna í Homrum (túrleiðari), Poul Vestergaard og Leon Smith (fyrsta dagin)
**Onnur fólk við fyrsta dagin**: Hilmar Johannesen, Maria Dam og Jóhan Mortensen

**Ábyrgd:** Eydna í Homrum

**Endamál:** Undankanning til at menna mannagongd at gera vísital fyri stovnsstødd fyri brisling undir Føroyum.

**Reiðskapur:** Yngultrol. Sedimentgrabbi.

## Um túrin

Farið varð av Havnini 1. november kl. 9. Fyrsta dagin blivu Tangafjørður og Skálafjørður kannaðir. Annan dagin varð økið eystanfyri kannað. Hesar báðar fyrru dagarnar var gott veður. Triðja dagin var vindur, so tá var ikki møguligt at trola, men siglt varð inn á nakrar firðir at vita, hvør ekkóskrift sást.

Fyrsta dagin var Hilmar Johannesen, sum er vanur at fiska brisling, við umborð á Magnusi Heinasyni. Hann legði lag á, hvussu hann lesur ekkóskriftina, og eisini kennir hann væl økið, sum vit leitaðu í. Av tí, at slíkar kanningar ikki eru gjørdar fyrr við Magnusi, og vit ikki vistu hvussu yngultrolið fór at rigga til brislingakanningar, varð avtala gjørd við manningina á Sildini, um at teir eisini vóru úti og leitaðu saman við okkum fyrsta og annan dagin, og so kundu teir møguliga kasta eftir skrift, sum vit ikki fingu fatur á. Tað vísti seg tó, at yngultrolið riggaði rættuliga væl at fiska eftir brislingi við. Men tað var kortini virðismikið, at Sildin eisini var úti, tí soleiðis kundu teir leita á Skálafjørðinum, meðan Magnus Heinason fór at kanna økið eystanfyri.

Á Skálafjørðinum varð, umframt brislingakanningarnar, eisini sedimentgrabbi tikin (Maria Dam, Umhvørvisstovan). Hetta sýnið skal kannast fyri mikroplast.

## Úrslit

Nakað av skrift var at síggja á Tangafirði og norður móti Oyri og inni á Skálafjørðinum. Í trolkanningunum á hesum økjum varð mest fingið av heilt smáum brislingi (alt var minni enn 8 cm), hóast okkurt av skriftini kundi týtt upp á størri brisling. Tó mettu teir, ið vanir eru at fiska brisling, at torvurnar vóru so mikið smáar, at teir neyvan høvdu kastað eftir teimum.

Annan dagin var tí avgjørt at kanna økið eystanfyri (sí mynd 1) eystur til 6° 08V. Orsøkin til at hetta økið varð valt er, at einstøk ár er brislingur skrásettur í yvirlitstrolingunum hjá Magnusi Heinasyni um várið í hesum økinum. Men sera lítið var at síggja av skrift eystanfyri. Kortini vóru trý hál gjørd uppi í sjónum millum 30 og 60 m dýpi (sí mynd 1).

Bert í tí eina hálinum var ein brislingur fingin. Annars vóru nakrar nebbasildir, høgguslokkar, heilt smáir hvítingar og lakssild fingin. Samanumtikið kundi staðfestast, at ikki nógvur brislingur var í hesum økinum.

Triðja dagin var siglt suður gjøgnum Sundalagið til Haldórsvíkar, inn um Elduvíksnes á Funningsfirði, suður gjøgnum Djúpini og inn á Gøtuvík at vita um ekkóskrift sást har. Men

har var sera lítið at síggja. Tó skal sigast, at av tí at veðrið var nakað verri henda dagin slapst ikki inn á smalru økini.

**Prøvatøka**
Á túrinum vóru 6 tóv tilsamans. Trolsýnini verða tikin fyri at greina sundur ekkóskriftina undir kanningunum og fyri at kanna støddarbýtið av fiskinum. Nytrur vóru tiknar av uml. 50 brislingum og 6 sildum.

**Nær sýnini verða liðugt viðgjørd**
Sýnini verða arbeidd í landi, og aldursgreinað tilfar skal vera til skjals skjótast gjørligt, og í seinasta lagi um ársskiftið.

**Tøkkir**
Vit takka Hilmari Johannesen frá ‘M/B Katrin’ og Heina M. Niclasen og manning umborð á ‘M/B Sildin’ fyri góða samstarvið hesar dagarnar.

Havstovan
hin 16. november 2018

Eydna í Homrum



**Mynd 1**. Siglingarleiðin hjá *Magnusi Heinasyni* á brislingakanningum í november 2018. Tilsamans vóru 6 trolstøðir tiknar.




**Mynd 2.** Longdarbýti av brislingi á túri 1848, 1-3/11 2018. Sum heild var heilt smáur brislingur fingin.